## DAGSINS MEINING

# Áhugaverd útbjóðing

Nú um dagarnar varð greitt, hvørji feløg fáa leititeigar í bretska partinum av Hvíta økinum. Hetta hendir eftir at bíðað hevur verið eftir eini loysn í markatrætuni í mong ár og eftir at Greenpeace fekk steðgað ætlaðu útbjóðingini í rættinum í London. Stórur spenningur hevur verið um hesa útbjóðing, tí oljufeløgini hava víst økjunum á Atlantsmótinum stóran ans. Úrslitið av útbjóðingini er eisini áhugavert fyri Føroyar, tí loyvini, sum eru latin, eru farin til feløg, sum eisini arbeiða á føroyskum øki. Amerada Hess hevur saman við BG og Dong fingið tillutað fleiri áhugaverdar teigar júst hinumegin markið. Sama hava Texaco og BP.

Tað ljóðar nú, at Shell, sum fyri tveimum árum síðani tók seg úr føroyskum øki og Atlantsmótinum, er á veg innaftur. Um eina mánað ella so fáa vit endaliga at vita frá Shell, um tað fer uppí loyvið hjá BP í føroyskum øki. Nógv bendir á at so verður. Hetta ikki minst orsakað av, at BP og Shell saman hava fingið tann teigin tey søktu um á bretskum øki. At eitt so stórt felag og við serstøkum royndum á djúpum vatni sum Shell nú møguliga aftur verður við í leitingini og seinni møguligu útbyggingini á føroyskum øki kann hava stóran týdning fyri Føroyar, nú vit hava sett okkum fyri at gerast oljutjóð. At Texaco eftir øllum at døma hevur fingið nøkur áhugaverd loyvi við markið kundi eisini týtt uppá, at felagið, sum við samanleggingini við Chevron verður eitt av teimum stóru oljufeløgunum, eisini er á veg innaftur í føroyskt øki. Texaco var eitt av feløgunum, sum ikki fekk tillutað nakað loyvi í 1. føroysku útbjóðingini, og tí kundi verið líkt til, at felagið heilt tók seg úr økinum. Við góðu teigunum í bretska partinum av Hvíta økinum kann verða spurt, um felagið fer at gerast partur av onkrum av loyvunum á føroyska økinum, á sama hátt sum Shell!

Nú er bert góður mánaði til Statoil fer undir at bora her og stutt eftir tað fer BP undir sína boring. Hendir tað at olja verður funnin longu til heystar, er greitt, at hetta kann gerast eitt avgerandi vegamót í føroyskari søgu sum heild. At tað komandi tvey árini verða boraðir 8 brunnar í føroyskum øki og 7 í bretskum nærum á somu leið kundi bent á, at Atlantsmótið kann gerast ein nýggjur oljulandslutur. Gongdin í løtuni har fleiri av heimsins størstu oljufeløgum vilja gera stórar íløgur her tykist benda á, at ein heilt nýggur vinnuvegur er í eygsjón. Tann var tann tíð tá føroyingar fóru undir at troyta nýggjar leiðir og fóru til Íslands og Grønlands. Nú verða so aftur nýggjar leiðir troyttar, men hesaferð heima hjá okkum sjálvum. Ella rættari í undirgrundini fyri sunnan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# 4% frá sjálvbjargni - ella aftur í ábyrgdarloysið

**Høgni Hoydal**
*Landsstýrismaður*



**Tann veruliga ræðumyndin er nú ritað í stein: Halda vit ikki rimmarfast við fullveldisætlanina, enda vit aftur í búskapårligum ábyrgdarloysi og fara aftur at tjóðskapa okkum undir danskari stýring.**

**Undir fullveldislandsstýrinum er danski blokkstuðulin miðvíst settur til viks, og er nú bert 4% av samlaða búskapinum í Føroyum.**

**Lata vit donsku stjórnina, danska fólkatingið og føroysku sambandsflokkarnar trýsta okkum til ábyrgdarloysi, rýkur vælferðin í Føroyum, og tað fer at kosta okkum milliardir.**

Eftir orðaskiftið á fólkatingi um Føroyar, áttu allar ávaringarklokkur hjá føroyingum at ringt. Ávaringin fyri, hvat hendir, um vit ikki taka fullveldi í Føroyum.

Boðskapurin frá donsku stjórnini og fólkatinginum er greiður: Tit skulu ikki vága tykkum at vilja fullveldi! Tit skulu ikki vága tykkum at taka ábyrgd! Tit skulu ikki vága tykkum at reka ein ábyrgdarfullan búskaparpolitikk! Tit skulu ikki vága tykkum at stovna búskapargrunn! Tit skulu ikki vága tykkum at klára tykkum sjálv! Tit skulu brúka teir donsku pengarnar til at snýsa alt skil omanav búskapinum!

Tit skulu atkvøða fyri sambandsflokkunum, so teir kunnu blæsa búskapin um koll aftur - og so skulu vit aftur seta harðar treytir, tá alt er farið á heysin!

Boðskapurin verður skrivaður við trýstamboðnum, sum eitur blokkstuðul, ið skal gykla føroyingum fyri, at teirra vælferð liggur í donskum pengum.

**Blokkstuðulin er eitt skuggaspæl**

Hesin sjónleikur hjá donskum politikarum og teirra viðhaldsflokkum í Føroyum, er tó eitt skuggaspæl. Roynt verður at myrkaleggja framtíðina, og síðani við eini veikari ljósglæmu at fáa fram eitt skuggaspæl, har blokkstuðulin skal sýnast sum ein ovurstórur skuggi á vegginum.

Men veruleikin er ein heilt annar. Føroyski búskapurin og vælferðin vaksa uttan blokkstuðul. Seinastu trý árini er støðugt meira av blokkstuðlinum lagdur til viks og hildin uttanfyri føroyska búskaparrenslið. Og í fjør vórðu bert 373 milliónir brúktar.

Føroyska bruttotjóðarúrtøkan var í árinum 2000: 8,2 milliardir krónur Av samlaða búskapinum í Føroyum, vóru hesir donsku pengar bert góð 4%.

Okkara egna framleiðsla, ber sostatt knøpp 96% av føroyska búskapinum, og okkum restar bert 4% í, at vit hava ein sjálvberandi búskap. Og alt bendir á, at hetta árið fer at flyta okkum enn nærri málinum.

**Gongur betur uttan blokkstuðul**

Hetta er úrslit av arbeiðinum hjá øllum føroyingum og einum stoltum vinnulívi, sum vil menna seg og klárar seg í altjóða kapping. Og tað er eisini úrslit av einum ábyrgdarfullum búskaparpolitikki, sum ikki vil brúka donsku pengarnar at blása búskapin upp til ein famtíðar brest.

Og niðurstøðan er, at tað hevur sjáldan gingið betur í føroyska búskapinum og við føroysku vælferðini. Nógv restar í at byggja upp á egnum beinum eftir heimastýrisóskilið, men við langtíðarætlanum, búskapargrunni og ábyrgd, fer eisini tað at eydnast.

**Sleppið ábyrgdini!**

Tann stóri vandin liggur í ovurhiting av búskapinum, útgjaring, stuttskygni og mistreystissáing.

Men tað er júst hetta, sum danska stjórnin, danska fólkatingið og føroysku sambandsflokkarnir mæla til í eini beinleiðis útvarpaðari og sjónvarpaðari komediu - ella tragediu. Vit skulu brúka teir donsku pengarnar. Vit skulu ikki leggja langtíðarætlanir. Vit skulu ikki stovna amboð til skilagóða búskaparstýring. Hvat billa vit okkum inn, at vilja taka fulla ábyrgd og klára okkum sjálv?

Tað hevði verið áhugavert at hoyrt, hvat búskaparfrøðingar siga til avleiðingarnar fyri vanliga føroyingin av hesum politikki hjá donskum og føroyskum politikarum.

**Onki alternativ finst til fullveldi**

Vit kunnu venda fullveldinum á høvdið ella á skák. Vit kunnu bólta rút og grundgeva, so bókasøvnini bólgna. Men tað sigur tað sama. Bert um vit vilja binda okkum í danska ríkið og sleppa rættinum til fullveldi einaferð med alla, ber til at gera nakra avtalu við donsku stjórnina. Vit kunnu so gera nakrar hissini yvirtøkur og spæla fólk í húsi, inntil skrædlið kemur aftur.

Men tað fer ikki at eydnast at trýsta okkum til ábyrgdarloysið. Allir føroyingar vita, at eftir ein búskaparligan fepurdans, endar rokningin hjá vanliga føroyinginum - og sjálvsvirðingin og kenslurnar fyri okkara tjóð, køvast í biddarargongd.

Tí vilja vit taka fullveldi.

# Framtíð landsins

**Hans P. Hansen**

Fyrst í nítiárunum vórðu Føroyar settar í undantaksstøðu vegna politiskt óskil. Danir róptu varskó. Nú er skuldin blivin alt ov stór, nú má steðgast vegna tess, at føroyingar ikki vistu hvat ein landsbúskapur var fyri nakað. Somu politikarar blivu við at bjóða seg fram. Eg má spyrja: er hetta ikki egoisman ella mafian, sum drívur alt tað politiska virksemið í Føroyum. Tað sum hvørt mansbarn veit: politikari er bert fyri seg og síni.

Mafia av grovasta slag.

Tað má sigast, og við nóg mikið av peningi í mín lumma, hini um rest, hugsi føroya fólk um framtíð landsins.

Nú fingu vit verkfall grundað á politiskari egoismu. Tað er at blíva við at ganga sum fyridømi. Hetta er landsstýrisins og løgtingsins ábyrgd.

Tann føroyska Margaret Thatcher, Ingeborg góðan byr, kroyst kapitalistar niður á knøini, gev ikki eftir fyri mafiabossunum.

Góðan byr Ingeborg.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.